

## Tiger Woods vann í Miami

Flestu av allarbestu golfleikarunum í heiminum vóru savnaðir til CA Championship kappingini, sum bleiv spæld í Miami um vikuskiftið, og enn einaferð vísti Tiger Woods, at hann er tann besti. Annað árið á rað sigraði hann í stóru kappingini, og við sigrinum tryggjaði hann sær 7,5 mió. kr. Danski goldspælarin, Thomas Bjørn var eisini við í kappingini, og hann endaði á einum áttanda plássi eftir at hava verið heilt frammi í oddinum alla kappingina.

## Innskiftari bleiv skiftur út

Tað hendir ikki ofta, at ein leikari, sum er innskiftur í einum fótbóltsdysti, verður skiftur út aftur. Men hett ahendi í landsdystinum millum Spania og Danmark leygardagin. Um Leon Andreasen var komin inn um miðjan fyrra hálvleik, men seint í dystinum bleiv hann tikin út aftur, tá Danmark royndi at fáa útjavnandi málið. Leon Andreasen bleiv sjálvur rættiliga forvirraður av hendingini. – Eg bleiv eitt sindur forvirraður, tí hatta havi eg ikki roynt fyrr, segði Leon Andreasen, sum ikki visti, at man kundi taka ein innskiftan leikara út aftur.

# Havnar Fimleikafelag til HM

**Genturnar hjá Havnar Fimleikafelag luttøku um vikuskiftið í HM-kapping í estetiskum fimleiki í finska býnum Espoo. Venjarin, Eyð Strøm, var væl nøgd við innsatsin hjá fimleikarunum**

FIMLEIKUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Havnar Fimleikafelag endaði næstaftast í HM-kappiningi í estetiskum fimleiki í finska Espoo. Tey vóru tó væl nøgd við úrslitið.*

Gentuliðið hjá Havnar Fimleikafelag fór til Finnlands í síðstu viku, har tær skuldu taka lut í heimsmeistarakappingini í estetiskum fimleiki. Kappingin var í finska býnum Espoo, og liðið hjá Havnar Fimleikafelag skuldi kappast ímóti 18 øðrum liðum úr níggju ymiskum londum.

Føroyska liðið endaði á 18. og næstaftasta plássi, men venjarin var nøgd við innsatsin hjá fimleikarunum.

### Ónøgd um karakterin

Eyð Strøm er venjari hjá gentuliðnum, sum var til HM um vikuskiftið. Hon var væl nøgd við innsatsin hjá føroysku gentunum, men hon helt als ikki, at karakterurin var í lagi.

- Eg var væl nøgd við innsatsin hjá gentunum. Tær høvdu nógvar nervar undan framførsluni, men eg haldi, at tað gekk avbera væl. Men vit vóru als ikki nøgdar við karakterin, sum vit fingu frá dómarunum. Teir geva tríggjar ymiskar karakterir, og vit hildu okkum vera nógv betri enn danska liðið, sum endaði aftast í kappingini. Í onkrum av karakterunum lá danska liðið omanfyri okkum, og hetta halda vit als ikki vera í lagi. Men síggja vit burtur frá tí, so gekst væl, og vit endaðu frammanfyri danska liðið, sum vit høvdu bæði vónað og væntað, sigur Eyð.

Hon helt annars, at kappingin var sera hørð, og sigur, at fleiri av hinum liðunum vóru ótrúliga sterk.

- Okkara gentur vóru á gólvinum á leið mitt í kappingini, men nervarnir vóru ikki bara komnir, tí tær vóru spentar. Tær sóu eisini fyrstu framførslurnar, og fleiri av liðunum eru also ótrúliga góð. Hetta vóru jú bestu liðini í heiminum, sum vóru á gólvinum, so tað var hørð kapping.

### Krevur nógv arbeiði

Fleiri av liðunum, sum tóku lut í HM-kappingini í Espoo, vóru ómetaliga góð, men Eyð heldur tað ikki vera ómøguligt, at føroysku liðini kunnu blíva so góð. Tað krevur, at man ger eitt gott arbeiði hjá teimum yngstu, sigur hon.

- Eg haldi tað ikki vera ómøguligt, at okkara lið kunnu blíva so góð. Vit mugu tó heilt niður til tey yngstu, og so arbeiða við eini langtíðar ætlan. Tað krevur nógv arbeiði, men um vit gera nakað við tað, so skal tað nokk ganga, sigur Eyð Strøm at enda.

# - Dømingin gekk væl

**Elna Johannesen var ein av føroysku dómarunum í HM-kappingini í estetiskum fimleiki í Finnlandi, og hon var væl nøgd við dømingina. – Vit fingu góð skoðsmál eftir kappingina**

FIMLEIKUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Føroysku fimleikararnir vóru ikki teir einastu her av landi, sum vóru við til HM-kappingina í estetiskum fimleiki í finska býnum Espoo. Tveir dómarar vóru eisini við í ferðalagnum, og teir skuldu báðir døma í HM-kappingini um vikuskiftið.

Dómararnir vóru Elna Johannesen og Beinta Danielsen. Erla skuldi vera við at døma kappingina hjá juniorunum, har føroyska liðið eisini var við, meðan Beinta skuldi døma kappingina hjá seniorunum.

### Fingu góð skoðsmál

Erla Johannesen og Beinta Danielsen hava verið á tveimum altjóða skeiðum undan kappingini í Finnlandi, og meðan tær dømdu í Finnlandi vóru tær eisini til eitt triðja skeið.

Erla Johannesen var væl nøgd við dømingina, og hon sigur, at báðir teir føroysku dómararnir fingu góð skoðsmál fyri avrikið í Finnlandi.

- Tað gekk ordiliga væl hjá okkum at døma. Eg dømdi juniorarnar, har 19 lið vóru við, meðan Beinta dømdi seniorarnar, sum høvdu seks lið. Tað gekk væl hjá okkum báðum, og eftir kappingina fingu vit eisini avbera góð skoðsmál.

### Skulu døma meir í ár

Skeiðini og kappingarnar, sum tær báðar eru til, eru liðir í útbúgvingini at gerast altjóða dómarar. Erla væntar, at tær skulu til fleiri kappingar seinni í ár.

- Eg vænti, at har liggja fleiri kappingar fyri framman seinni í ár. HM verður í Spania í juni mánaða, og har vera vit væntandi við sum dómarar.

Erla sigur eisini, at tað krevur nógv at vera dómari á hægsta stigi úti í heimi.

- Ja, hetta er ógvuliga krevjandi. Fyri at vera við í toppinum skulu vit døma nógv uttanlands. Ein trupulleiki í hesum føri eru pengarnir. Fimleikasambandið stuðlar okkum so væl sum til ber, men pengarnir eru ikki teir heilt stóru, so møguleikarnir eru ikki teir bestu at fara uttanlands at døma fleiri ferðir. Vit royna tó at fara til tær kappingar, sum vit hava tíð og ráð til, staðfestir Erla at enda.